gult cyan magenta svart



# Stríðast enn um kollfirðingar

**– Tað kann væl henda, at vit noyðast at leggja arbeiðið niður fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag**

FAKFELAGSSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

Stríðið um arbeiðsfólkið í Kollafirði er ikki av enn. Tvørturímóti er vandi nú fyri, at stríðið er í ferð við at harnað um, hvørjum felag arbeiðsfólkið í Kollafirði skulu vera limir í.

Kollafjarðar Arbeiðarafelag er limur í Føroya Arbeiðarafelag. Men nú Kollafjørður kom upp í Havnina, vildi Havnar Arbeiðsmannafelag hava arbeiðsmenninar í Kollafjørði sum limir.

Havnar Arbeiðsmannafelag heldur, at tað er óheppið, at arbeiðsfólk í somu kommunu eru undir tveimum sáttmálum.

Hetta varð tó afturvíst. Men fyri tað valdar ikki friður um málið.

Ingeborg Vinther sigur, at Tórshavnar Kommuna vil ikki betala Føroya Arbeiðarafelag limagjald, eftirløn og lívstrygging hjá arbeiðsfólki í Kollafirði.

Hetta sama er galdandi fyri dagrøktararnar í Kollafirði, sum eisini eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Ingeborg Vinther sigur, at hon hevur fleiri ferðir gjørt býráðnum varugt við hetta og at limagjaldið, eftirlønin og lívstryggingin hjá arbeiðsfólkið og dagrøktarum í Kollafirði skal betalast til Føroya Arbeiðarafelag, tí tað er har, at kollfirðingarnir eru limir.

– Men vit fáa onki svar frá Tórshavnar Býráð.

Ingeborg Vinther sigur, at Føroya Arbeiðafelag fer tí at viðgera spurningin um at fara í verkfalli ímóti Tórshavnar Kommunu. Hon sigur, at fáast viðurskiftini ikki í rættlag nú, verður arbeiðið helst niðurlagt til Tórshavnar Kommuna hevur fingið viðurskiftini í rættlag.



*Nú nærkast av álvara, at vit fara at seta tiltøk í verk ímóti Tórshavnar Býráð, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag*

# Aftur ein rækjutrolari komin inn á Vágsfjørð

**Rækjutrolarin er nú á veg til Danmarkar til eftirlit, men um einar 14 dagar verður hann klárur at fara til fiskiskap**

SKIPSKEYP
*Áki Bertholdsen*

Nú er aftur ein rækjutrolari komin til Vágs.

Tað eru Jákup Olsen, sum hevur keypt ein brúktan rækjutrolara úr Íslandi. Trolarin er yvirtikin, hevur fingið føroyskt flagg og er skrásettur í Vági. Hann eitur nú "Hvannaberg".

Jákup Olsen, sigur, at trolarin er keyptur fyri 14 milliónir frá einum felag í Íslandi, sum fór á húsagang. Men sjálvur hevur trolarin verið skrásettur á San Vincent. Hann hevur mest fiskað á Flemish Cap, men onkran túr hevur hann verið við Svalbarð.

Tá ið íslendska felagið fór á húsagang, varð báturin lagdur í eitt norskt felag, haðani hann nú er keyptur til Vágs.

Hetta er ein 22 ára gamal bátur, sum á sinni varð bygdur í Noregi til Grønlands. Seinni er hann so aftur seldur íslendska felagnum.

Talan er um ein av teimum smærru rækjutrolarunum. Hann tekur 250 tons, men hann hevur fulla verksmiðju umborð.

Jákup Olsen væntar, at góðir møguleikar eru at fáa tað at bera til við nýggja bátinum, tí væl er hann lítil, men afturfyri er hann heldur ikki serliga dýrur.

Báturin hevur fingið fiskiloyvi frá landsstýrinum og fer mest at fiska við Svaldbarð og í russiskum og norskum sjógvi. Og tað er hann góður til, sigur Jákup Olsen.

Báturin skuldi fara úr Reykjavík í gjárkvøldið til Skagen, har hann skuldi til eftirlit fyri at verða góðkendur, Tað var norskr seljarin, sum treytaði sær, at báturin fór á skipasmiðju í Skagen.

Jákup Olsen væntar at hann verður klárur at fara til fiskiskap um einar tvær vikur. Tað vera 14 mans við honum. Skipari verður sandvíkingurin, Eyðun Johannesen, sum býr á Tvøroyri, hann er eisini ein av eigarunum.



*Jákup Olsen*

### Mugu bjarga kvotuni

Annars hevur tað verið ikki sørt av mótstøðu ímóti at fleiri rækjbátar koma til landið, tí sagt verður, at grundarlag er ikki fyri fleiri skipum.

Hesum er Jákup Olsen ikki samdur í.

– Tað er altavgerandi , at vit brúka teir fiskidagar, okkum er tillutað, tí annars eru tað stór virði, sum gleppa okkum av hondum og tað kann ikki forsvarast. Ongin tosar um, at vit hava mist fiskidagar til eini fimm rækjuskip, tí vit hava ikki brúkt teir dagar, okkum er tillutað. Tað er púra greitt, at hini londini skerja okkara fiskidagar, tá ið vit kortini ikki brúka teir dagarnar, sum vit fáa tillutað.

Jákup Olsen sigur, at fyri nøkrum árum síðani høvdu føroyingar 2.700 dagr við Svalbarð. Nú hava vit bara 1.300 eftir. Orsøkin til at vit hava mist so nógvar dagar, er tí at vit ikki hava brúkt teir, sigur Jákup Olsen.

## Hava fingið nýggja nevnd

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevði aðalfund um vikuskiftið og tá varð nýggj nevnd vald.

Í nevndini sita nú Jon Konoy, skrivari, úr Leirvík, Gerhard Lognberg, borgarstjóri, úr Skopun, teir eru báðir afturvaldir. Nývald í nevndina eru Gunn Joensen, borgarstjóri, úr Vestmanna, Herálvur Jacobsen, bygdaráðslimur, úr Sørvági og Sunniva Kollslíð, bygdaráðslimur, úr Hvalvík .

Úr nevndini fóru Petur Kruse úr Sørvági, Anna Larsen úr Porkeri og Oskar Joensen av Nesi, tey stillaðu ikki uppaftur.

gult cyan magenta svart



Vreiðir festarar í Oyndarfirði:

# Jarðarráðið tekur okkum av ræði

**Festarar í einum hagaparti í Oyndarfirði eru ikki glaðir um, at Jarðarráðið hevur tikið avgerð um, at fremja eina útskifting í bygdini. Teir óttast, hvat útskiftingin fer at hava við sær innangarðs, tí vandi er fyri at missa vetrarbitið, halda teir. Jarðarráðið metir hinvegin, at útskiftingin fer at geva einum manni betri møguleikar at reka ein bóndagarð við góðum rakstrarúrsliti**

ÚTSKIFTING
*Stefan í Skorini*



*Øssur Midjord frá Matrikulstovuni greiddi frá, hvussu ein útskifting fer fram, meðan bygdafólk og festarar lýddu á*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Føroya Jarðarráð hevur tikið avgerð um at ein partur av kongsjørðini í Oyndarfirði skal útskiftast. Talan er um tveir hagapartar, sum skulu býtast umaftur. Tað er tann gamli próstahagin Skoratind, sum prósturin á Nesi átti í gamlari tíð, og Dalhaga talan er um.

Tað er Ingvar Johansen, sum hevur sókt sýslumannin í Eysturoynni um at fáa jørðina útskifta. Ingvar eigur Dalhaga, sum er einbýttur hagapartur, ið er 4,5 merkur, meðan hann eigur 3,5 merkur av øðrum hagaparti, Skoratindur nevndur. Hesin hagapartur er 10,5 merkur tilsamans, og har eru sjey aðrir festarar, ið hava ein mørk í part. Ingvar hevur søkt um at fáa sín part av jørðini í Skoratindi lagda saman við Dalhaga, so at tað verður ein hagapartur.

Soleiðis kann hann ráða yvir allari sínari jørð uttan at vera saman við øðrum festarum. Føroya Jarðarráð hevur gingið hansara ynski á møti. Tey gomlu mørkini millum hagapartarnar vera tikin burtur, og nýggj sett ístaðin.

Tá grannastevna var í Oyndarfirði mánakvøldið atkvøddi Jarðarráðið fyri útskiftingini, sum nú verður løgd fyri eina útskiftingarnevnd.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram, at festararnir í hagapartinum sluppu ikki at atkvøða, men Jarðarráðið atkvøddi fyri allar partarnar. Teir smáu festararnir eru illir um, at Jarðarráðið kann taka teir av ræði, men soleiðis er mannagongdin.

### Óttast útskiftingina

Teir smáu festararnir í Skoratindi, sum eiga eina mørk í part, kvíða fyri eini útskifting, sum fer at taka vetrarbitið í bygdini frá teimum. Sum nú er sleppur seyðurin at ganga á vetrarbiti í bygdini.

Tað er so, at yvirliggjandi hagi altíð eigur undirliggjandi bø. Um útskiftingin lagar tað soleiðis, at teir smáu vera kroystir av bønum um bygdina, so verða teir avskornir frá vetrarbitinum og seyðahúsunum.

– Vit eru fyrst og fremst bangnir fyri, hvat útskiftingin fer at hava við sær innangarðs, sigur ein av festarunum.

Breið semja var millum teir smáu festararnar á grannastevnuni, at teir fara ikki at lata sær lynda, um útskiftingin verður gjørd soleiðis, at teir missa atgongd til vetrarbiti og seyðahúsini, so teir vera noyddir at ganga langt fyri at geva seyðinum.

– Tey uppskot, sum vit hava sæð eru soleiðis, at vit skulu ganga langa leið fyri at geva okkara seyði. Ein geiri er oman í bygdina, men seyðurin finnur ikki altíð útav at koma oman her, sigur ein annar av festarunum.

### Møguleiki fyri betri rakstri

Jóannes Dalsgarð, stjóri í Føroya Jarðarráði, heldur, at ynski hjá Ingvari er ógvuliga rímiligt, tá hugsað verður um, at hann vil leggja sína jørð saman til ein hagapart.

– Vit meta tað vera eitt ógvuliga rímiligt ynski at gera eina útskifting í hesum báðum hagapørtunum, so at ein maður kann hava sína jørð einsamallur, bæði viðvíkjandi rakstrinum og framtíðar útbygging. Tað er lættari at hava ein haga ein at vera partur av tveimum saman við øðrum, sigur Jóannes Dalsgarð.

Jarðarráðið metir sostatt, at umstøðurnar hjá bóndanum at fáa betri búskaparligt úrslit vera betraðar mundandi, og tað er óheppið, at ein bóndi hevur fest í tveimum hagapørtum.

– Festarin hevur í øllum førum betri møguleika fyri at skapa eitt frægari búskaparligt úrslit, sigur Jóannes Dalsgarð.

Jóannes leggur tó dent á, at tað ber ikki til at vita frammanundan, hvussu útskiftingin verður, men tað kundi hent, at hann fekk betri møguleikar fyri at velta og annað.

Enn er ikki greitt, hvørjar ætlanir Ingvar hevur viðvíkjandi útbygging, um útskiftingin verður framd. Sosialurin royndi at fáa viðmerking frá Ingvari, men hann var ikki at fáa fatur á týsmorgunin.

### Síggja onga meining

Teir smáu festararnir siga seg ikki duga at síggja nakra høpi í útskiftingini, tí fleiri hava roynt at fingið garðin at bera seg men uttan eydnu.

– Tað sigst, at útskiftingin hevur til endamáls, at bóndin kann byggja eitt fjós til neyt, og at hann kann hava neyt í sínum haga. Men tað ber ikki til at hava neyt í Dalhaga, tí tað er ov bratt til so stór djór, og tey detta oman, sigur Jón Ingi Eidesgaard.

Smáu festararnir eru sannførdir um, at einasta broytingin eftir útskiftingina eftir øllum at døma verður, at bóndin kann hegna sítt øki inni, og teir missa vetrarbiti og atgongd til seyðahúsini.

Jón Ingi er heldur ikki av tí áskoðan, at slík mannagongd er í trá við útoyggjaálitið, sum verður lagt fram í næstum, tí hann heldur, at tað skulu vera fólk á staðnum, ið eiga at taka avgerðirnar viðvíkjandi jørðini.

Nú skal málið leggjast fyri eina útskiftingarnevnd, og Føroya Jarðarráð hevur einki við sjálva útskiftingina at gera. Útskiftingarnevndin kemur fram til ein úrskurð, men festararnir kunnu kæra henda úrskurðin til yvirútskifting. Landsstýrið útnevnir formannin í nevndini, sum hevur tilknýti til Matrikulstovuna. Hinar báðar limirnar útnevnir dómarin. Hesir nevndarlimir skulu vera ógegnigir og ikki hava nakað tilknýti til Eysturoynna ella Oyndarfjørð.



*Jóannes Dalsgarð metir at ein festari hevur betri møguleikar fyri góðum rakstrarúrsliti eftir útskiftingina*



*Tað var ikki sørt av ónøgd millum festararnar um útskiftingina, tí teir stúra fyri avleiðingunum. – Vit eru bangnir fyri, hvat útskiftingin fer at hava við sær innangarðs*

*Mynd: Jens Kr. Vang*